Dátueftirlitið

Fylgiskjal 12

Tórshavn, tann 15. september 2020

J.nr: 20/00164-17

Ummælissvar

Dátueftirlitið hevur tann 19. august 2020 fingið uppskot til løgtingslóg um yvirvøku við vakmyndatóli til ummælis. Viðmerkingar eru settar í talrað niðanfyri.

1. **Viðvíkjandi serligari loyvisskipan (§ 4 í lógaruppskotinum)**

   Viðvíkjandi § 4 í uppskotinum, so stendur, at politiið í samráð við landsstýrismanninum í serligum førum eftir umsókn kann geva privatum loyvi til við vakmyndatóli at yvirvaka almennan veg, tá hetta verður mett neyðugt til tess at fyribyrgja lógarbrotum. Hetta verður lýst sum ein loyvisskipan, sum skal tryggja, at í undantaksførum, tá tað verður mett politifakliga neyðugt við yvirvøku við vakmyndatóli, kann verða givið privatum undantak frá banninum í § 2 at yvirvaka øki við vanligari ferðslu.

   Dátueftirlitið setir spurnartekin við, at tað er landsstýrismaðurin, ið, saman við politiinum, skal avgera hetta, sí eisini pkt. 3 niðanfyri viðvíkjandi viðmerkingum um eftirlitsmyndugleika og uppgávubýti.

   Politiið hevur politifakligu førleikarnar at meta um, hvørt tað er neyðugt ella ei við atliti til kriminalitet, men yvirvøka av borgarum kemur undir viðgerð av persónsupplýingum. Tí eigur eisini at metast um atlitið til borgararnar í samband við viðgerð av persónsupplýsingum.

   Tað verður gjørt greitt í viðmerkingunum til uppskotið, at talan er um eina undantaks-loyvisskipan, ið bert skal nýtast í serligum førum. Tó, so metir Dátueftirlitið, at tað eigur at vera politiið í samráð við fakkunnleikanum á økinum, t.e. Dátueftirlitinum, sum í undantaksførum kann geva loyvi til uppseting av vakmyndatólum.

   Nevnast kann sum samdømi, at lógarbroyting á sama økinum (yvirvøka við vakmyndatóli) í Danmark í 2007 (LOV nr 542 af 08/06/2006), hevði við sær, at politistjórar í Danmark kundu mæla almennum myndugleikum og privatum til (henstille) at seta upp vakmyndatól. Hendan heimildin at mæla til uppseting av vakmyndatóli var, sbrt. viðmerkingunum til lógina, ætlað støðum (situationer) har yvirvøka við vakmyndatóli kundi hava týdning fyri at fyribyrgja og at kanna møgulig yvirgangsálop.

   Tað er munur á donskum og føroyskum viðurskiftum, um vit sammeta nøgd av kriminaliteti og slag av kriminaliteti, undir hesum yvirgangshóttanir, yvirgangur, innbrot og persónvandamikil kriminalitetur.

Dátueftirlitið

Við omanfyri standandi í huga, mælir Dátueftirlitið til, at undantaksførini eiga at verða lýst nágreiniliga, soleiðis, at markið fyri, hvat undantøksstøður fevna um, ikki verður sett ov lágt ella ov tilvildarliga.

2. Viðvíkjandi strikingartíð (goymingartíð) (§ 8, stk. 3, í lógaruppskotinum)

Sum útgangsstøði skulu upptøkur, sbrt. § 1, strikast í seinasta lagi 30 dagar eftir upptøkuna. Sbrt. meginreglunum í núverandi persónsupplýsingarlóg og komandi dátuverndarlóg, so skulu persónsupplýsingar ikki goymast longri enn neyðugt er, fyri at lúka upprunaliga endamálið við viðgerðini. Meginreglurnar í komandi dátuverndarlóg, § 7, stk. 1, nr. 3 og 5, áseta, at persónupplýsingar skulu:

- Vera nøktandi, viðkomandi og avmarkaðar til tað, sum er neyðugt til tey endamál, sum tær verða viðgjørdar til.
- Goymast soleiðis, at ikki ber til at eyðmerkja tey skrásettu í longri tíðarskeið enn neyðugt við atliti at endamálinum við viðgerðini.

Talan er um dátuavmarkingar-meginregluna og goymingaravmarking.

Sum samdømi um strikingartíð, so nevnir The European Data Protection Board (EDPB) striking og goymingartíð í sínum leiðreglum um viðgerð av persónsupplýisngum av vakmyndatólum (Guidelines 3/2019 on processing of personal data through video devices, Version 2.0, Adopted on 29 January 2020, partur 8, brot 120-122: https://edpb.europa.eu/sites/edpb/files/files/file1/edpb_guidelines_201903_video_devices.pdf).

Leiðreglurnar gera greitt, at innan fyri eitt stutt tíðarbil, eigur tað at verða kannað, um tað er neyðugt at goyma persónsupplýsingarnar ella ikki. Haldgóðar orsøkir til uppseting av vakmyndatólum eru vanliga grundaðar í ynski um at fyribyrgja herverki og at goyma prógvtilfar frá kriminaliteti. Í flestum førum varnast ein handilseigari herverk/skaða innan ein ella tveir dagar. Við atliti til omanfyri nevndu dátuavmarkingar-meginregluna og goymingaravmarking, so eiga persónsupplýsingar at verða strikaðar innanfyri nakrar fáar dagar, helst av sær sjálvum (automatisk). Jú longri goymingartíðin er (serliga um hon er longri enn 72 tímar), jú størri eiga grundgevingarnar at vera fyri løgmætinum (legitimitet) fyri endamálinum og tørvinum á goyming. Um dátuábyrgdarin ikki bert nýtir vakmyndatólsupptøkur fyri at yvirvaka sína ogn, men eisini ætlar at goyma upplýsingarnar, so má dátuábyrgdarin tryggja sær, at goymingin er neyðug fyri at røkka ætlaða endamálinum. Um so er, so eigur goymingartíðin at vera greitt avgjørd fyri hvørt einstakt viðgerðarendamál. Tað er dátuábyrgdarans ábyrgd at allýsa goymingartíðina við atliti til meginreglurnar um neyðsyn og proportionalitet og fyri at vísa, at dátuábyrgdarans viðgerð er í samsvar við dátuverndarlógina.

GDPR (*EUROPA-PARLAMENTETS OG RÅDETS FORORDNING (EU) 2016/679 af 27. april 2016 om beskyttelse af fysiske personer i forbindelse med behandling af personoplysninger og om fri udveksling af sådanne oplysninger og om ophævelse af direktiv 95/46/EF (generel forordning om databeskyttelse)*) gevur limastatum sínum møguleika at regulera hetta økið serstakt (specifikt), og Danmark hevur ásett 30 dagar strikingar-tíð, m.a. við atliti til brotsmenn, ið kanna (rekognoscering) eitt møguligt mál, t.d. eini sethús, har

Dátueftirlitið

brotsmenninir ætla at gera innbrot. Danmark hevur verið plágað av innbrots-kriminalitet í fleiri ár. T.d. var talið á innbrotum 4.947 í 2. kvartali í 2019 (sí heimasíðu hjá Danmarks Statistik: https://www.dst.dk/da/Statistik/nyt/NytHtml?cid=30052#). Dátueftirlitið loyvir sær tó at seta spurnartekin við, um 30 dagar strikingartíð er proportionalt við atliti til føroysk viðurskifti við lítlum kriminaliteti og ongum yvirgangi. Dátueftirlitið eftirlýsir sostatt í lógaruppskotinum eina nærri grundgeving og upplýsingar í mun til ítøkiligar kanningar, herundir eina serføroyska tørvsmeting, til tess at lýsa tørvin fyri 30 dagar strikingartíð í Føroyum nærri.

Dátueftirlitið metir, at lógaruppskotið eigur at leggja seg upp at vegleiðingini hjá EDPB. Hetta kundi t.d. fört við sær, at upptøkur, sbrt. § 1, skulu strikast í seinasta lagi 72 tímar aftaná upptøkuna, um so er, at dátuábyrgdarin ikki hevur heimild til annað, sbrt. komandi dátuverndarlóg.

Dátueftirlitið mælir til, at ásetingin um, at upptøkurnar skulu strikast í seinasta lagi 30 dagar eftir upptøkuna, verður strikað. Hetta úrslitar í, at dátuábyrgdari skal akta komandi dátuverndarlóg, undir hesum dátuavmarkingar-meginregluna og meginregluna um goymingaravmarking, sbrt. vegleiðingini hjá EDPB.

3. Viðvíkjandi eftirlitsmyndugleika (§ 9, í lógaruppskotinum)

Í § 9 verður ásett, at Dátueftirlitið hevur eftirlit við viðgerð av persónsupplýsingum, sbrt. § 8, ið viðvíkur víðarigeving og striking.

Í §§ 5 og 6 er ásett, at viðgerð av persónsupplýsingum í samband við yvirvøku við vakmyndatóli av privatum og almennum myndugleikum er fevnd av komandi dátuverndarlóg, ið kemur í gildi 1. januar 2021

§§ 5 og 6 geva tí fatan, at Dátueftirlitið hevur eftirlit við allari lógini, sum hon er, tí eftirlit við viðgerð av persónsupplýsingum hoyrir til málsøkið hjá Dátueftirlitinum. Tó stendur nágreinað í § 9, at Dátueftirlitið hevur eftirlit við viðgerð av persónsupplýsingum, sbrt. § 8, t.e. víðarigeving og striking. Tulkast hetta andstøðuliga (modsætningsvis), so hevur Dátueftirlitið ikki eftirlit við aðrari viðgerð enn viðgerð sbrt. § 8. Í viðmerkingunum til § 9, stendur greitt, at ásetingin "hevur ikki við sær, at Dátueftirlitið, sum hevur eftirlit við, um henda løgtingslógin sum heild verður hildin [sic]." Dátueftirlitið hevur sostatt ikki eftirlit við, um hendan løgtingslógin sum heild verður hildin.

Sbrt. núverandi persónsupplýsingarlóg (løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum broytt við løgtingslóg nr. 24 frá 17. mai 2004), § 36, hevur Dátueftirlitið eftirlit við allari viðgerð, sum lógin fevnir um. Sbrt. komandi dátuverndarlóg, § 66, hevur Dátueftirlitið eftirlit við allari viðgerð av persónupplýsingum, sum løgtingslógin fevnir um.

Vakmyndatólsnýtsla er vanliga viðgerð av persónsupplýsingum, og Dátueftirlitið hevur eftirlit við slíkari viðgerð. Tað er tí torført at skilja viðgerð við vakmyndatólum frá aðrari viðgerð, soleiðis, at Dátueftirlitið bert hevur eftirlit við viðgerð fevnd av § 8, t.e. víðarigeving og striking.

Dátueftirlitið

Nevnast skal, at Dátueftirlitið, sbrt. § 9, stk. 2, í lógaruppskotinum, samstundis hevur yvirlitið av vakmyndatólum, so tað tykist náttúrligt fyrisitingarliga, at eftirlitið við lógini eisini verður savnað undir Dátueftirlitinum.

Dátueftirlitið staðfestir tí, at tað er ógreitt í lógaruppskotinum, hvør myndugleiki hevur eftirlit við lógini, og, at tað er sannlíkt, at hendan óvissa fer at hava avbjóðingar við sær, tí stovnar ikki vita, hvussu uppgávubýtið er.

Uppgávubýtið má gerast greitt, soleiðis, at avvarðandi myndugleiki er greiður yvir, hvat fyri umsiting og eftirlit viðkomandi hevur ábyrgd av. Annar møguleikin er, at persónsdátuverndin av borgarum dettur niður í fyrisitingarligar rivur, tí býtið er ógreitt.

Dátueftirlitið mælir fyrst til, at Dátueftirlitið hevur eftirlit við viðgerð, sum er fevnd av lógini. Í øðrum lagi verður mælt til, at tað verður lýst og ásett nágreiniliga, hvør myndugleiki, ið hevur eftirlit við lógini.

4. Viðvíkjandi fráboðan til Dátueftirlitið (§ 9, stk. 2, í lógaruppskotinum)

Tann, sum setur upp vakmyndatól, myndatól, ella líknandi, skal boða Dátueftirlitinum frá, og Dátueftirlitið skal føra eina skrá yvir hesi.

Dátueftirlitið metir, at ein tílík fráboðan innihaldsliga má lúka nøkur lágmarkskrøv, og tí er skjótt, at talan er verður um krøv til eina "nøktandi" fráboðan ella eitt loyvi, sum er praksis í dag.

Almennu viðmerkingarnar til lógaruppskotið siga, at við uppskotinum er ikki lagt upp til eina loyvisskipan í sambandi við yvirvaking við vakmyndatóli. Ein privatur partur kann tí – í tann mun tað er innanfyri teir karmar, sum eru í § 3 í uppskotinum – yvirvaka við vakmyndatóli uttan loyvi frammanundan. Almennir myndugleikar kunnu eisini uttan loyvi yvirvaka við vakmyndatóli, um hetta er innanfyri reglurnar í m.a. dátuverndarlógini.

Sum almennu viðmerkingarnar til lógaruppskotið nevna, so skal vakmyndatólsupptøkan fara fram við atliti til galdandi lóggávu, undir hesum dátuverndarlógina. Royndirnar hjá Dátueftirlitinum vísa, at upprunaliga uppsetingin (og harav viðgerðin av persónsupplýsingum) av vakmyndatólum oftani er óheimilað, og at uppsetingin fyrst verður rættað eftir vegleiðing ella boðum frá Dátueftirlitinum. Núverandi lógaruppskot ásetur tvey lágmarkskrøv til fráboðanina í viðmerkingunum til § 9, stk. 2. Viðmerkingarnar siga, at: "Upplýsingar skulu latast Dátueftirlitinum, so, at tað er púra greitt, hvar vakmyndatóli er sett upp og hvat upptøkan fevnir um."

Dátueftirlitið mælir til, at upplýsingarnar viðvíkjandi, hvat upptøkan fevnir um, verða nágreinaðar, soleiðis, at ein nøktandi fráboðan – umframt at upplýsa, hvar vakmyndatólið er sett upp – fevnir um:

a) skíggjamynd,
b) endamál við uppseting av vakmyndatóli,
c) strikingartíð og
d) trygdarfyriskipanir (fyriskipanarlig, fysisk og teknisk trygd).

Dátueftirlitið

Um nøktandi trygdarfyriskipanir ikki eru settar í verk, er váði fyri, at óviðkomandi kunnu fáa atgongd til upptøkurnar.

Eisini mælir Dátueftirlitið til, at tað verður greitt gjølla frá í viðmerkingunum, hvussu Dátueftirlitið skal bera seg at, um lágmarks-krøvini til eina fráboðan ikki verða hildin, t.e., skal málið sendast til løgregluna beinanvegin ella skal Dátueftirlitið ráðgeva fráboðara um, hvussu uppsetingin kann gerast heimilað, sum praksis er í dag. Sí í hesum sambandi viðmerkingar um uppgávubýtið omanfyri.

Endiliga mælir Dátueftirlitið til, at kunngerðarheimild verður sett inn í lógaruppskotið, soleiðis, at landsstýrismaðurin kann áseta reglur um krøv til fráboðan um uppseting av vakmyndatóli, t.e. hvat ein fráboðan skal innihalda.

5. Viðvíkjandi yvirvøku av starvsfólki og arbeiðsmonnum við vakmyndatóli

Almennu viðmerkingarnar til lógaruppskotið nevna, at tað kunnu vera reglur og grundreglur í arbeiðsrættinum, sum hava við sær avmarkingar í møguleikanum hjá serliga arbeiðsgevarum at yvirvaka starvsfólk og har sum serlig fyrivarni tí skulu takast.

Siðvenja í Føroyum hevur verið, at vakmyndatól bert verða sett upp í samband við herverk og stuldur, við einkultum undantøkum har trygdarspurningar gera seg galdandi. Í hesum liggur undirskilt, at yvirvøka við vakmyndatóli av starvsfólkum ikki er loyvd. T.d. kann yvirvøka av pengakassanum við diskin vera loyvd, men ikki avgjørd yvirvøka av starvsfólkinum.

Útgangsstøðið og praksis hjá Dátueftirlitinum hevur verið, at skeltast skal týðiliga við, at vakmyndatól verða nýtt á arbeiðsplássinum, soleiðis, at fólk eru greið yvir, at viðgerð við vakmyndatólum fer fram, og hvør hevur dátuábyrgd av viðgerðini. Tað er samstundis ein treyt við viðgerðini, at starvsfólk ikki eru undir støðugum eftirliti við vakmyndatóli. Viðskiftafólk skulu verða kunnað við skelting, og starvsfólk skulu hava gjølla kunning á starvsfólkafundi, í starvsfólkahondbók, ella á tann hátt starvsfólk vanliga verða kunnað á arbeiðsplássinum.

Viðvíkjandi samtykki kann nevnast, at sum útgangsstøði kunnu starvsfólk ikki geva eitt galdandi samtykki til at vera undir yvirvøku við vakmyndatóli, tí tað verður mett, at tey eru undir trýsti frá arbeiðsgevaranum (over-/underordnelsesforhold), t.e. tað verður lagt til grund, at ein noktan kann fáa neiligar avleiðingar fyri tey.

Dátueftirlitið spyr eftir størri umrøðu av arbeiðsrættarligum viðurskiftum í mun til vakmyndatólsyvirvøku av starvsfólki.

6. Viðvíkjandi nýtslu av "dashcam" – tólbrettis-myndatól

Nýtsla av dashcam (stytting fyri enska "dashboard camera", t.e. tólbrettis-myndatól), er vakmyndatól, sum t.d. er sett á tólbrettið ella í bakrútin í einum akfari. Vakmyndatólið tekur film av m.a. akbreytini.

Dátueftirlitið

Dashcam ella dashcams í fleirtali, verða vanliga nýtt við tí fyri eyga at skjalprógva møgulig óhapp á akbreytini, og tey verða nýtt í stóran mun í útlondum. Dátueftirlitið hevur hoyrt um nýtslu av slíkum tólum í Føroyum.

Dátueftirlitið mælir til, at tað verður nágreinað í viðmerkingunum til lógaruppskotið, hvørt dashcams eru fevnd av § 2, t.e. almenna forboðnum í lógaruppskotinum um at yvirvaka gøtu, veg, pláss ella líknandi øki, sum verður nýtt til vanliga ferðslu Annar møguleiki er, at tað verður nágreinað í viðmerkingunum, um slík nýtsla er fevnd av allýsingini í § 1 ella ei.

7. Viðvíkjandi eftirgjørdum vakmyndatólum (DA: attrap).

Sbrt. almennu viðmerkingunum, so fevnir løgtingslógin ikki bara um yvirvaking, sum hevur til endamáls at fyribyrgja lógarbrotum, men eisini vakmyndatólsyvirvøku, sum hevur annað endamál, t.d. trygd ella sosialt kontrol.

Hóast talan ikki er um viðgerð av persónsupplýsingum, so vil Dátueftirlitið viðmerkja, at nýtsla av eftirgjørdum vakmyndatólum tekur seg fram, og Dátueftirlitið hevur eisini hoyrt um slíka nýtslu í Føroyum. Hóast eftirgjørd vakmyndatól ikki viðgera persónsupplýsingar, so er talan um atferðarstýring og møguliga um inntriv í rættindi til privatlív hjá borgarum. Svenska Datainspektionen skrivar soleiðis í teirra vegleiðing um eftirgjørd vakmyndatól:

"Dataskyddsförordningen och kamerabevakningslagen gäller inte för kameraattrapper, men om du vill sätta upp en attrapp är det bra att rikta den så att grannar eller förbipasserade inte tror att de blir bevakade.

Datainspektionens granskningar visar att attrapper ofta leder till att personer upplever samma kränkning av den personliga integriteten som då en riktig bevakningskamera används. Vid klagomål mot en viss bevakning kan Datainspektionen komma att inleda tillsyn i syfte att avgöra om en viss kamera är en attrapp eller inte." (https://www.datainspektionen.se/vagledningar/kamerabevakning/privatpersoner/)

Dátueftirlitið vil við hesum viðmerkja, at tað møguliga hevði verið gagnligt, um uppskotið reguleraði ella forbjóðaði nýtslu av eftirgjørdum vakmyndatólum.

Vegna Dátueftirlitið

John Nolsøe Olsen, fulltrúi